## DAGSINS MEINING

# Óheppin í orðavali

Nú um dagarnar varð orðaskifti á tingi um ymisk mál, sum viðvíkja útheiminum, eitt nú um at nokta fyri samhandli við ávís lond í Afrika. Tað var undir hesum orðaskiftinum, at tingmaðurin Jógvan við Keldu var heldur óheppin í sínum orðavali. Hann vísti á, at tað var m.a. partamanni sínum Óla Breckmann og ávísum fø.royskum vinnulívsmonnum fyri at takka, at apartheid varð avtikið í Suðurafrika ella í hvussu er høvdu hesir menn gjørt sítt til at mótvirka hesi skipan.

Søgan er júst tann øvugta. Tað var Óli Breckmann, sum fólkatingsmaður og løgtingsmaður eggjaði føroyskum vinnulivsmonnum at taka upp fiskivinnusamstarv við myndugleikarnar í Namiba, ið tá var hjáland hjá tí apartheidstýrda Suðurafrika. Hetta hendi um somu tíð, sum stórur partur av heiminum boykottaði sama stýrið. Her gingu m.a. Norðurlond á odda og var allur samhandil við Suðurafrika bannaður av stjórnunum. Hetta var eisini í tráð við ynskið hjá ST, sum fordømdi hvíta minnulutastýrið í Suðurafrika og stuðulaði sanktiónspolitikkinum. Hann var í tráð við ynskini hjá teimum svørtu við Nelson Mandela á odda. Tað skuldi so eisini vísa seg, at altjóða trýstið móti og boykottið av apartheidstýrinum vóru við til at fella hetta sama stýrið.

Bara í Føroyum og onkrum eystureuropeiskum londum vóru fólk, sum ikki vildu góðtaka umrødda boykott. Tey boykottaðu sanktónirnar, sum skuldu fáa apartheid avtikið. Og her var tað táverandi fólkatingsmaðurin og løgtingsmaðurin Óli Breckmann, sum stóð á odda við at gera avtalur við apartheidmynduleikarnar í syðra parti av Afrika. Tað má tí milt sagt sigast at vera eitt óheppið orðaval, tá Jógvan við Keldu á tingsins røðarapalli lovprísar sama persóni fyri at hava virkað ímóti apartheidstýrinum. Tað er at umskriva søguna ella at vera stuttmintur.

Helst má tingmaðurin hava verið mismaltur. Tað vísti seg eisini, at Óli Breckmann sjálvur hevði ikki hug at taka orðið í orðaskiftinum eftir at hava verið róstur av partamanninum fyri at hava verið millum heitastu mótstøðumenn móti apartheid. Tað man hava kenst honum illa at hava fingið slíkt skoðsmál, tá allur heimurin veit, at nettupp sami ÓB var ein av teimum ídnastu til seta kíla í felags og solidariska boykottpolitikkin móti hvíta apartheidstýrinum.

Tað er eingin orsøk til at grava í hesum gomlu syndum, tí tað er gjørt oftani áður. Men tá ein fólkafloksstingmaður sjálvur tekur málið upp og broytir søguna, so má talast at.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Landssjúkrahúsið í sori!

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksins*



Vit hava enn einaferð fingið staðfest, at Landssjúkrahúsið er so niðurpínt, at nógv skal til fyri at skapa eitt rímiligt støði.

Vit sóu tað, tá sjúkrasystrar á eini deild valdu at siga upp. Tað gjørdu tær, tí arbeiðsumstøðurnar vóru ótolandi.

Tá valdi leiðslan at geva seg eitt sindur, og úrslitið var, at allar sjúkrasystrarnar valdu at halda fram í størvunum.

Nú hava vit aftur fingið prógv fyri vánaligu umstøðunum á Landssjúkrahúsinum.

Nú var tað sjálv leiðslan á Landssjúkrahúsinum, sum bjóðaði tingfólkum at síggja vánaligu umstøðurnar.

Serliga fullu eyguni á útslitnu sengurnar, sum á ongan hátt eru tíðarhóskandi.

Á Landssjúkrahúsinum eru einar 30 sengur skiftar út seinastu 30 árini. Tað sigur alt um viðurskiftini.

Fyri skomm skyld hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum nú biðið løgtingið um at játta eina millión kr., so nakrar sengur kunnu skiftast út, og ábøtur kunnu gerast á nøkur viðurskifti.

At landsstýrismaðurin biður um eina eykajáttan, er væl eisini eitt tekin um hansara ringu samvitsku.

Vit, sum eru fyri ríkisfelagsskapinum, eru í døpurhuga, nú samgongan hevur valt at skerja ríkisstuðulin, ístaðin fyri at nýta peningin til tað, sum hann er ætlaður.

Ríkisstuðulin hevur verið við til at tryggja okkum í Føroyum eitt framkomið sjúkrahúsverk, eina framkomna skúlaskipan og eitt framkomið almannaverk.

Øll hesi viðurskifti eru nú í stórum vanda fyri at fara fyri skeyti.

Vit í Sambandsflokkinum vilja ikki lata okkum slíka framferð lynda, og vit fara at stríðast ímóti oyðileggingarpolitikkinum hjá sitandi samgongu.

Vilja føroyingar sær sjálvum væl, so geva teir sitandi samgongu durafjórðingin á valinum 30. apríl.

Við Javnaðarflokkinum nýggjan politik!

# Samgongan ræðist sín egna politik í dag – tað er væl skilligt!

**Birgir Mohr**
*Sandur*



Tann politiski meirlutin í Løgtinginum og Føroya Landsstýri skrivaðu samgonguskjal í 1998 um, at Føroyar skuldu hava fullveldi í hesum valskeiðinum, og eisini skuldu vit hava eina – um ikki tvær – fólkaatkvøður um ríkisrættarmálið, soleiðis at tá fullveldið varð framt áðrenn 30. apríl 2002, so skuldi liggja greitt framyvir, nær loysingin var endalig.

Hvat er so komið burturúr? Jú, nógvar samráðingar, summar sera pínligar fyri okkum føroyingar, nógv reyp, nógvar luftkastellur, nógvur tjóðskaparromantikkur, men úrslitini á sjálvstýrisleið eru ikki mong. Bert eitt veruligt úrslit: yvirtøkan av skipaeftirlitinum, sum varð sagt bert at vera ein skrivstova í Tórshavn!

Hitt úrslitið, sum samgongan reypar sær av, er ein skaðahending: teir hava avskrivað kr. 367 mill. úr Danmark í ár við teim fylgjum, at vit mangla hendan pening á fleiri økjum longu nú – nakrar vikur seinri.

Annars eru teir farnir at halda seg til – ja, næstan at háðlova HEIMASTÝRISLÓGINI – og alt gott um tað, men tað var og er ikki teirra politikkur! Tað er politikkurin hjá heimastýrisflokkunum.

Fólkaatkvøður tordu teir ikki at halda, og teir høvdu heldur einki úrðslit at halda nakra fólkatkvøðu um. Og nú vilja summir skjóta hesa út um 2012, sum teir sjálvir hava viðtikið á tingi, men tað man vera valagn!

Føroya Javnaðarflokkur fer tí at fremja ein nýggjan politik á ríkisrættarliga økinum, við at avtala eina sjálvstýrislóg við ta donsku stjørnina í friði og náðum uttan konfrontatión og í samstarvi við teir føroysku politisku flokkarnar, sum vilja vera við til hendan politik.

Sjálvstýristilgongdin er ein “proses”, sum tekur nógv ár at náa á mál við, um tað ikki skal kosta okkum øllum ov nógv í lívsvirðum og lívsfrælsi. Vinna vit tjóðarfrælsi, men missa persónliga lívsfrælsi fyri stóra meirilutan av Føroya fólki, so hava vit mist meira fyri minni.

Tí er tað so alneyðugt at fáa fyritreytirnar fyri sjálvstýrismálinum upp á pláss fyrst, síðan kunna vit – ella tey, sum tá liva – taka avgerð um ríkisfelagsskapin.

Hettar er tað Føroya Javnaðarflokkur alla tíðina hevur sagt, eisini tey seinastu fýra árini, men samgongufIokkarnir lurtaðu ikki eftir. Nú eru tað tveir av trimum, ella kanska allir tríggir, sum siga nakað, sum líkist, men tað er kanska bert sum valagn, tí sporini hesu seinastu fýra árini, tey gera okkum ótrygg, “sporene skræmmer”!

Føroya fólk hevur uppiborðið ein annan og betri politik, eitt nýtt Løgting, eitt nýtt Landsstýri og ein nýggjan løgmann. Hesum ferð Javnaðarflokkurin at virka fyri.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Soleiðis kann tað føroyska samfelagið ikki stýrast framyvir

**Edmund Joensen**



Meðan almenna propagandaðin er, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur sitið tungt á lokinum á landskassanum, er veruleikin ein heilt annar. Raksturin av samfelagnum er dýrkaður í hesum valskeiðinum við 950 mió. krónum.

Hetta er úrslitið á løgtingsfíggjarlógini áðrenn eykajáttanir í hesum árinum eru taldar við. Eykajáttanirnar Í 2001 vóru ikki færri enn 207 mió. krónur (til samanberingar kann nevnast at í 1997 vóru 11 mió. krónur latnar í eykajáttanum).

Skulu vit meta eftir teimum uppskotum, sum liggja í løgtinginum, so verða eykajáttanirnar risastórar í hesum árinum.

**Nýtt met í oysli**
Hetta er nýtt føroyskt met í oysli. Útreiðslurnar eru í meðal vaksnar umleið 10% um árið síðani henda samgongan tók við. Landsstýrið frá 1994 til 1998 hevði ein vøkstur, sum var umleið 1% um árið.

Havast má eisini í huga, at landsstýrið hevur minkað fruminntøkurnar beinleiðis við 400 mió. krónum um árið. Hetta, saman við “ringvirkningunum” svarar til eina minking í føroyska búskapinum, sum liggur omanfyri milliardina. Hesar inntøkur eru endaliga burtur, ikki bara í eitt ár, men hvørt ár framyvir.

Omaná alt hetta hevur samgongan bundið komandi landsstýrir til risaíløgur nógv ár fram í tíðina.

Soleiðis kann tað føroyska samfelagið ikki stýrast framyvir. Tað er øllum hugsandi føroyingum greitt.

**Vilja halda fram**
Samgongan biður nú um at sleppa at halda fram. Teirra ætlan, sum eisini er samtykt í løgtinginum, røkkur fram til 2012. Tá skulu allar útreiðslur, sum Danmark í dag rindar (bæði blokkstuðul og allar aðrar útreiðslur av felagsmálum) vera fluttar yvir á herðarnar á føroyingum einsamøllum.

Tá skal vera klárt at loysa endaliga. Hetta er sokallaða sjálvstýristilgongdin, ið løgmaður, sum hægsti myndugleiki í landsstýrinum, hevur fingið samtykta í løgtinginum.

Veljarin hesaferð má gera sær púra greitt, at sleppur samgongan at halda fram, so gongur ikki long tíð, til øll rættindi hjá føroyingum í ríkinum eru burtur, og landsins búskapur er kollrendur einaferð afturat.

# Bræv til veljarafjøld Føroya – Vit vilja

**Jónas Johnsson**



–Samla fólkið fyri hægstu virðum lívsins og sýna politiska ábyrgd í øllum lutum.

–At í Føroyum skulu føroyingar ráða og byggja land.

–Taka fulla ábyrgd og fult ræði, stig fyri stig, í øllum viðurskiftum okkara.

–Raðfesta borgaran, herundir sjúk og veik, framum betong, asfalt, stál og annað kalt.

–Miðvíst vísa á borgara vinarligar loysnir, skilvíst frælsi og rættskafni í øllum lutum.

–Varðveita og betra skilagóð og virðilig sambond við onnur lond - til fólksins gagn.

–Arbeiða fyri tí góða lívinum við burðadyggari vælferð – ikki einstaka ideologi.

–Slætta um vinstra-høgra sjaskið og virka sum politisk miðleingja.

–Mótvirka býttum yvirdirvi og skammiligt afturhaldni.

**Tit mugu skilja**
–At uttan fleiri umboð floksins á tingi fer Føroyaskútan at rulla, og rulla sera illa.

–Kanska eru deyðir dinosaurar undir Føroyum. Omaná eru so flokkar, ið hava tikið okkara sjálvstýrispolitikk, sum einastu hyggjuráð. Teirra skráir miseydnaðust ár eftir ár og í 98. Abbaflokkurin kann tí vinna seg til deyðis, men alt fleiri stúra missin av meistrandi klípinum – úrmælingunum. Vónandi kemur hann yngdur og sterkur av váli.

–Tíðindi um olju longur niðri, kunnu verða góð. Kanska eru risagoymslur. Einki er likið. Nakrir metrar eykað er eingin forðing. Olja slættar og smyr, umframt gagnar so nógvum øðrum. Tað ger okkara flokkur við.

–Tó, ov nógv eru borin av angist og velja tað ósømiliga, ið er sáað av sambandskari herferð; at drekka annans mjólk - ella gávuhugi frá feitum jólamonnum, og maka sær, meðan danir sveitta. Tey kalla tað “rættindi” og toga so persiennurnar niður.

–Borið djúpt, rakið rætt, kjósið Sjálvstýrisflokkin, flokkin, sum borgar fyri virðiligum arbeiðssemi og tekur við ábyrgd undir ábyrgd. Allir rópa sjálvstýri í dag, men bara ein flokkur, júst hann, eigur tær óspiltu ílegurnar frá upprunaligu tjóðskaparrøslu Føroya!

–Eg velji tað upprunaliga træið. Tað ið ber tær bestu fruktirnar.

# Tilhaldið – ein sólskinssøga

**Leivur Hansen,**
*býráðslimur*



Tað var mikið hugaligt at fáa høvi til at vera millum mongu føðingardagsgestirnar hjá Tilhaldinum í Tórsgøtu Grækarismessudag.

Fýra ára føðingardagurin hjá stovninum varð hildin við hugnaligari samkomu, har m.a. húsakórið var við til at seta sín serliga dám á dagin.

Vit hoyrdu um mongu mennandi og spennandi tiltøkini, ið skipað verður fyri í húsinum, og hvussu glað tey eldru vóru fyri at hava fingið hesi forkunnugu húsini sum karm um virksemið, ið har fer fram undir góðum og tryggum umstøðum.

–Hetta er avgjørt besta tiltakið, teimum gomlu at frama, sum kommunan nakrantíð hevur tikið stig til, helt onkur av teimum vælhýrdu føstu gestunum fyri.

–Ja, ein sonn sólskinssøga, legði ein annar smílandi aftrat, eftir at kaffi og lagkøka vóru komin á borðið, og prátið gekk av tí besta.

Tað var á Grækarismessu í 1998, at dyrnar - eftir hálvt ára fyrireikingararbeiði - fyrstu ferð lótu upp í Tilhaldinum, og sigast má, at tey eldru tóku húsið til sín frá fyrsta degi av.

Fyrsta árið vitjaðu stívliga 7.000 fólk í húsinum. Í fjør fór talið upp um 11.000!

Kommunan læt húsini til endamálið og hevur harumframt viðlíkahaldið um hendur, meðan landið (Almannastovan) rindar dagliga raksturin, sum liggur um eina millión krónur um árið.

Almannastjórin fegnaðist sum gestarøðari um ta framúr góðu undirtøku, hetta tiltakið hevur fingið, og vónaði, at tílík hús eisini verða sett á stovn aðrastaðni í landinum.

Hesum tóku øll, ið lýddu á, undir við.

Tilhaldið í Tórsgøtu var fyrsta fruktin, vit her í Havn heystaðu av eldraálitinum, sum ein bólkur við umboðum fyri býráðið og heilsuverkið læt úr hondum í 1998.

Stutt eftir keypti og umbygdi kommunan eini stór sethús Oman Hoydalar til eldrasambýli. Har halda í dag 10 búfólk til.

Eldraálitið legði eisini lunnar undir, at kommunan í 2000 ognaði sær Marinustøðina, sum nú verður innrættað til umlætting og uppvenjing av eldri fólkum og dagstøð fyri minnisveik.

Somuleiðis er avgjørt at byggja røktarheim fyri minnisveik í Vallalíð, har pláss verður fyri 16 fólkum.

Fimta ítøkiliga tiltakið við støði í eldraálitinum er avgerðin hjá býráðnum um at seta eina sjúkrasystir í starv til burturav at røkja heimavitjunartænastu fyri eldri fólk.

Alt hetta hendir, hóast kommunan í grundini als onga ábyrgd hevur av eldraøkinum í løtuni, men lat tað liggja á hesum sinni.

Eg ynski Tilhaldinum og tykkum, ið har koma saman til gaman og álvara, góða eydnu framyvir og takki fyri hugnaliga samveru!

# Maersk ude i den store verden

**Svend Erik Jensen**
*Titangade 3, 2200 København N*

Maersk Air, der flyver mellem Færøerne og Danmark, er en del af Maersk koncernen. I Maersk koncernen findes Maersk Medical, der har fabrikker i Hårlev og Osted i Roskilde amt. På disse fabrikker er der ordnede forhold og arbejderne er fagligt organiseret. Anderledes ser det ud på Maersk Medicals fabrik Euromedical i Malaysia. Her nægter ledelsen de ansatte retten til at lade sig repræsentere af en fagforening.

Aktivister i Arbejderbevægelsens Internationale Forum, AIF i Roskilde amt, har nu indklaget Maersk Medical for brud på OECD's retningslinier for multinationale selskaber. Et er juridiske spidsfindigheder, men det handler også om virksomheders etik og moral. Maersk Medicals måde at agere på i Malaysia er en opførsel der er forums koloniherrer værdig. Sagen om retten til at lade sig repræsentere har kørt i årevis. Senest fjernede man en kutymemæssig bonus og da arbejderne protesterede blev fire af de mest fagligt aktive fyret.

Sådan opfører Maersk koncernen sig ude i Malaysia. Det er ganske enkelt forkasteligt, at Maersk på den måde tilsidesætter de mest elementære menneskerettigheder. Hvor er det flovt, at danske virksomheder opfører sig sådan ude i den fattige del af verden. Da jeg flere gange har besøgt Færøerne og benyttet mig af Atlantic Airways, vil jeg opfordre til, at alle der flyver mellem Færøerne og Danmark benytter Atlantic Airways og ikke Maersk Air.

Som forbrugere kan vi, med egne handlinger, fortælle Maersk koncernen, at måden arbejdere behandles på i Malaysia ikke skal nyde opbakning ved køb af flybilletter hos Maersk Air.